LM-067/2022

fylgiskjal 18.

HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

Til
Umhvørvis og Vinnumálaráðið

Tórshavn, hin 10. september 2021
Málnr.: 21/01007-2
Tykkara málnr.:

Viðvíkjandi: Hoyringarskriv til uppskot til Náttúruverndarlógina
Viðmerkingar frá landsdjóralæknadeildini

Heilsufrøðiliga starvsstovan takkar fyri møguleikan, at gera hoyringarskriv til uppskot til løgtingslóg um náttúruvernd (Náttúruverndarlógin).

Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur bert fyrihildið seg til sjálvt lógaruppskotið um náttúruvernd.

Almennar viðmerkingar
Stórur tørvur er á lóggávu, sum varar av náttúrumargfeldinum í Føroyum. Heilsufrøðiliga starvsstovan fegnast um, at arbeiði við Náttúruverndarlógini er so langt ávegis.

Sum skilst, skal landstýrisfólkið, sum varar av náttúruverndarlógini, loyva øllum innflutningi av lívverum til Føroya. Undantikið er tó, at Heilsufrøðiliga starvsstovan skal loyva innflutningi sbrt. "Løgtingslóg um innflutningi og hald av vandamiklum djórum o.ø.", og "kunngerð um innflutning av eksotiskum djórum."
Heilsufrøðiliga starvsstovan vil staðiliga mæla frá, at landstýrisfólkið, sum varar av Náttúruverndarlógini, fer inn um geiran hjá landsdjóralæknanum, hægsta veterinera myndugleika, tá ið tað snýr seg um innflutning av djórum til Føroya, eisini tá talan er um innflutning av ikki eksotiskum djórum.

Ein av høvuðsuppgávunum hjá landsdjóralæknanum, sum hægsti veterineri myndugleiki, er, at fyribyrgja fremmandum sjúkum í at koma og festa sær fót í Føroyum. Hetta kann verða til vanda fyri føroyska djóralívið, og í ringasta føri, sum avleiðing av hesum, fyri djóramargfeldið og náttúrumargfeldið. Fyri nettupp at lúka krøvini í hesi veterinerru uppávu, eru longu kunngerðir, ið regulera økið viðvíkjandi innflutningi og flutningi av djórum. Hesar eru:

-Løgtingslóg nr. 58 frá 22. apríl 2003 um innflutning og hald av vandamiklum djórum o.ø.
-Løgtingslóg nr. 16 frá 23. februar 2001 um djórasjúkur
-Kunngerð nr. 82 frá 18. mai 2021 um at innflyta hundar, kettur og gitnaðarevni
-Kunngerð nr. 52 frá 31. mai 2007 sum samhandil við og innflutning av hóvdjórum úr triðjalondum
-Kunngerð nr. 14. frá 7. apríl 2004 um innflutning av eksotiskum dýrum
-Kunngerð nr. 51 frá 31. mai 2007 um vernd av djórum undir flutningi
-Kunngerð nr. 3 frá 14. januar 2003 um forboð móti flutningi av livandi kleyvdýrum oyggjanna millum v.m.

Í § 1 í uppskoti til Náttúruverndarlóg er ásett, at "*Endamálið við løgtingslógini er at røkja margfeldið (...)*". Mett verður í hesum sambandi at djórasjúkur mugu

Smyrilsvegur 7, 2. hædd
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. +298 556 400
E-mail: hfs@hfs.fo
Homepage: http://www.hfs.fo

og skulu hava avgerandi tyngd, tá tað snýr seg um tilætlaðan innflutning av djórum. Hetta orsaka av, at um fremmandar sjúkur koma til landið, kann tað lívfrøðiliga margfeldið skjótt verða í vanda. Tí er tað sera umráðandi at djórasjúkulógin og kunngerðir við heimild í henni verða brúktar í metingini, tá loyvi um innflutning av djórum verða givin. Lógir og kunngerðir, sum landsdjóralæknin umsitur og fyrisitur. Djórasjúkulógin skal tí í einari møguligari lógarkonflikt hava størstu tyngdina.

Av tíð at umráðið um innflutning og flutning av eksotiskum djórum longu er væl regulerað, er ongin grund til at hetta eisini verður regulerað í Nátturuverndarlógini, sum eisini verður sagt í viðmerkingum.

Men við atliti at djórasjúkum, verður staðiliga mælt til, at allur tilætlaður innflutningur av øllum djórum framhaldandi liggur hjá landsdjóralæknanum at fyrisita og umsita, eisini innflutningur av ikki eksotiskum djórum.

Heilsufrøðiliga starvsstovan skilur tað soleiðis at Náttúruverndarlógin regulerar, røkir og hevur umsjón við plantum og innsløddum djórum, (t.d. rottum, froskum, skørum), ið longu eru komin til Føroya, og eisini teimum sum ótilætlað kunnu koma til Føroya í framtíðini.

Eitt umráðið, ið hevur stóran tørv á regulering, og sum ikki sæst nóg væl aftur í lógini, er innflutningur av mold og innflutningur av plantum við mold. Hendan moldin kann hava uppiíhangandi smáverur/kykt, ið kunnu koma at gera skaða á margfeldið í Føroyum. Dømi um óhepnar avleiðingar av ótilætlaðum innflutningi, sum kunnu nevnast eru, flatmaðkurin, morsnigilin og vespan. Mælt verður til, at hetta økið verður gjørt greiðari í Náttúruverndarlógini, og verður lagt til umhvørvisstovuna at fyrisita.

Viðmælt verður at brúka fleiri dømir til frágreiðingar í viðmerkingunum.

Serligar viðmerkingar

Til § 1, og til pkt. 1.3 í almennu viðmerkingunum á s. 15
"(...) undir burðadyggum virksemi (...)" : Orðið burðardygt, verður í dag nýtt í øllum møguligum samanhangum, og verður ikki neyðturviliga tulka eins, um tú t.d. ert vinnurekandi við fíggjarligum áhugamálum, privat persónur ella myndugleiki á t.d. náttúrverndar ella djórafakliga økinum. Tørvur er tí á, at allýsa orðið "burðardygt", so heiti passar til endamálsorðingina í hesi lóg, og ikki kann misskiljast.

Til § 7, stk. 1, nr. 5
" ***(...)Tøka til(...) "til gransking, undirvísing ella flokkanarvirksemi (...)"***: Viðmerkjast skal at sambært § 10 í djóravælferðalógini krevst loyvi frá landsdjóralæknanum at brúka djór til m.a. royndir og undirvísing. Vill djór eru eisini fevnd av djóravælferðalógini. Sbrt. § 10, stk. 4 kann landsstýrismaðurin í kunngerð áseta nærri reglur, íroknað at gera undantak frá ásetingini um at veita loyvi í § 10, stk. 1.

Til § 12 viðvíkjandi "(...)innflutningi og útflutningi (...)"
HFS skal í hesum sambandi minna á veterineravtaluna, Heilsufrøðiligu avtaluna millum Føroyar og ES (avgerð nr. 1/2001 frá ES kommisjónini). Í hesum sambandi eru kunngerðir, ið viðvíkja innflutning og útflutning settar í verk. Herundir, kunngerð nr. 58 frá 30. apríl 2002 um veterinert eftirlit ísv. samhandil, inn,- og útflutning av djóraúrdráttum og øðrum, sum ikki eru ætlaðir til matna.

Til kappittul 3, fremmandar lívverur
Í sambandi við útseting verður nevnt í viðmerkingum á s. 53 triðsíðsta reglubrot, " *at loyvi kann heldur ikki gevast til útseting í ósamsvari við forboð ásett í heimild í løgtingslóg um innflutning og hald av vandamiklum dýrum § 1, stk. 1., og sambært kunngerð um innflutning av eksotiskum dýrum § 3, stk. 2 er forboðið at sleppa eksotiskum dýrum leysum út í føroysku náttúruni.*"
Mint verður í hesum sambandi eisini á § 15 í djóravælferðalógini, sum ásetir bann fyri at sleppa djórum út í náttúruna. Viðmerkingarnar til § 15 í djóravælferðalógini siga m.a. "*Við hesi áseting verður bannað at sleppa djórum út í náttúruna, um tey ikki natúrliga hoyra heima í føroysku náttúruni, ella um orsøk er til at halda, at djórini eru ella kunnu vera natúrliga stovninum, øðrum djórastovnum ella plantulívinum at bága. Heimildin at sleppa ávísum djórum í náttúruna skal tulkast avmarkandi, og er ivi um, hvørt eitt djór kann hava negativa ávirkan á føroysku náttúruna, djóra- ella plantulívið, skal djórið als ikki sleppast út í náttúruna. Djórini, sum talan er um, kunnu bæði vera eksotisk djór, sum eru innflutt úr øðrum londum og tí ikki hoyra natúrliga heima í føroysku náttúruni, og djór, sum hóast tey hava verið leingi í Føroyum, í roynd og veru ikki eru natúrlig í føroysku náttúruni. Seinna førið fevnir t.d. um kettur, ið gerast útiløgukattar, ið kunnu vera fuglalívinum at bága, ella kaninir, ið kunnu leggjast í lundaland og yvirtaka lundaholurnar.*"

Til § 13, stk. 3
"(...) orsaka av at fremmandar lívverur verða settar út (...)" : Sí omanfyri, - tað er ikki loyvt at sleppa fremmandum djórum leys í náttúruna.

Yvirskipað til § 14
Heilsufrøðiliga starvsstovan mælir staðiliga til ikki at fara inn um geiran hjá landsdjóralæknanum viðvíkjandi innflutningi av djórum.

Til § 17
Her kann vandi verða fyri lógarkonflikt. § 17 ásetir *"(...) ongum undan møguligum loyvum til innflutning ella útseting, sum krevjast eftir aðrari lóggávu."* Meginreglan í djóravælferðalógini er, at tað als ikki er loyvi at seta djór út í føroysku náttúruna, um tey ikki nátúrliga hoyra heima har. Umráðandi er at avmarkingar í útseting, innflutningi og útflutningi í lógarverki, sum Heilsufrøðiliga starvsstovan varar av, koma týðiliga til sjóndar í eini møguligari kunngerð um hvørjar lívverur (djór) kunnu setast út uttan serligt loyvi, sbrt. § 16, stk. 2 og samsvarandi við § 14 í Náttúruverndarlógini.

Fyri at sleppa undan møguligari lógarkonflikt kann ein møguleiki vera at heiti **"lívvera"** verður allýst øðrvísi, soleiðis at djór ikki eru fevnd av heitinum lívvera. Í allýsingini fyri **"lívvera"** kunnu djór verða tikin burturúr; um djórini skulu verða fevnd av eini ávísari grein, kunnu tey nevnast positivt, sum **"djór"**.

Samanumtikið
Tað er stórur tørvur á eini lóg sum Náttúruverndarlógini í Føroyum. Náttúruverndarlógin skal tó ikki fara inn um geiran hjá landsdjóralæknanum, og viðgera loyvi um innflutning av djórum til Føroya. Hetta økið er longu vart av lógum og kunngerðum, sum landsdjóralæknin umsitur og fyrisitur.

Fyri at sleppa undan lógarkonflikt kann ein møguleiki vera at heiti *"lívvera"* verður allýst øðrvísi, soleiðis at djórini ikki eru fevnd av heitinum lívvera. Í allýsingini fyri *"lívvera"* kunnu djór verða tikin burturúr; um djórini skulu verða fevnd av eini ávísari grein, kunnu tey nevnast positivt, sum *"djór"*.

Umráðandi er at kunngerðir til lógina verða gjørdar alt fyri eitt, og at fólk verða sett í starv samsvarandi viðmerkingunum.

Vinarliga

Bergljott Øssursdóttir Midjord
Løgfrøðingur

Oddjó Stovugarð
Embætisdjórlækni